## Soltnasta kappingin í 10 ár

Í teimum 90 landskappingardystunum, sum vórðu spældir í 1. deild hjá monnum í 2003, vóru gjørd 283 mál. Hetta er eitt miðaltal fyri dystin upp á 3,144. Hetta er minsta máltalið í 10 ár. Frammanundan var málfátækasta árið 1993, tá ið 3,022 mál vórðu skotn fyri hvønn dystin.

Málríkasta kappingarárið seinastu 10 árini var 1998. Tá vóru heili 385 mál gjørd í teimum 90 dystunum. Hetta gevur eitt miðaltal á 4,278 mál fyri hvønn dystin – ella í miðal eitt mál meira fyri hvønn dyst enn í fjør.

*(Kelda: Fótbóltur 2003)*

## Eiler revsaði harðast

Í landskappingini 2003 var Eiler Rasmussen tann dómarin, sum gav flest kort í miðal fyri hvønn dystin, tá ið gulu og reyðu kortini verða umroknað til sektarstig, har gult kort er 1 stig og reytt kort 4 stig.

Hvørja ferð, Eiler hevði ábyrgdina av einum dysti, vóru 5,11 sektarstig givin í miðal. Eiler dømdi 9 dystir, gav 26 gul kort og 5 reyð kort.

Tann, sum gav flest gul kort samanlagt var Niklas á Líðarenda, sum gav 33 gul kort, men hann dømdi tveir dystir fleiri enn Eiler, og harafturat gav hann bara 1 reytt kort.

Eiler Rasmussen var tann, sum gav flest reyð kort – hann gav 5 – meðan Petur Skarðenni gav 3 í sínum 10 dystum.

*(Kelda: Fótbóltur 2003)*

## Botnurin mest plágaður av kortum

HB vann FM heitið, og meistaraspælararnir fóru ikki ofta út um mark á vegnum móti FM-heitinum. HB fekk í 2003 nevniliga bara 22 gul og 1 reytt kort í landskappingini 2003. Tað var bara EB/Streymur, sum skikkaði sær eins væl av 1. deildarfeløgunum.

Hinvegin vóru botnliðini í 1. deild óskikkilig. Skála, sum akkurát slapp sær undan niðurflyting, fekk flest sektarstig (gult kort telur 1 stig og reytt kort 4 stig). Spælararnir hjá Skála fingu 29 gul kort og 4 reyð kort í sínum 18 dystum.

VB var næstovast á sektarlistanum, og síðani komu niðurflytararnir í FS Vágum.

Tað vóru teir VB-spælarar, sum fingu flest sektarstig. Slobodan Madzar og Predrag Zivkovic vóru teir mest revsaðu spælararnir í landskappingini 2003. Slobodan fekk seks gul og eitt reytt kort, meðan Predrag fekk tvey gul og tvey reyð. Predrag var einasti spælarin, sum fekk tvey reyð kort í landskappingini í fjør.

Næstir á sektarlistanum komu Arnhold Berg og Iulian Florescu hjá Skála, sum báðir fingu fimm gul og eitt reytt kort.

*(Kelda: Fótbóltur 2003)*

## B36 var undantakið

28 útlendskir spælarar vóru við í landskappingini hjá 1. deild monnum í 2003. Talið var eitt vet lægri enn í 2002, tá ið 32 útlendingar spældu í 1. deild.

Einasta felagið, sum ikki hevði útlendingar á liðnum, var B36, meðan VB hevði flest útlendingar – seks í tali. Fleiri teirra høvdu tó verið so leingi í Føroyum, at teir taldu ikki sum útlendingar í fótbóltshøpi.

Seks jugoslavar spældu í 1. deild í 2003, fimm danir, fimm póllendingar, fýra rumenar, tríggir brasilianar, tveir íslendingar, ein bosniari, ein letlendingur og ein moldavi.

Av teimum 28 spælarunum, spældu 11 fyri fyrstu ferð í Føroyum í 2003.

Tann útlendski spælarin, sum hevði spælt longst í 1. deild í Føroyum, var Marek Vierzbicki, sum fyrstu ferð spældi í Føroyum í 1995. Hann umboðaði í fjør EB/Streym, men er nú farin aftur til Klaksvíkar at spæla.

*(Kelda: Fótbóltur 2003)*

# Havnafeløgini berjast um gullið

**Heini í Skorini**
*heini@sosialurin.fo*

Aftur í ár hevur Sosialurin spurt ítróttajournalistarnar kring landið, hvussu fótbóltskappingin í bestu mansdeildini fer at síggja út við árslok í heyst.

Sambært teimum verður landskappingin 2004 eitt slag um Havnina, meðan óvissan um útlendsku leikararnar, tá tippað varð, hevur gjørt tað torført at meta um fleiri av liðunum.



### *Finnur Helmsdal* – OYGGJATÍÐINDI

1. B36
2. KÍ
3. HB
4. NSÍ
5. GÍ
6. B68
7. ÍF
8. VB
9. Skála
10. EB/Streymur



### *Suni Merkistein* – ÚTVARP FØROYA

1. HB
2. B36
3. KÍ
4. NSÍ
5. B68
6. VB
7. GÍ
8. EB/Streymur
9. ÍF
10. Skála



### *Jákup Mørk* – SOSIALURIN

1. HB
2. B36
3. NSÍ
4. GÍ
5. KÍ
6. B68
7. ÍF
8. VB
9. EB/S
10. Skála



### *Emil L. Jacobsen* – DIMMALÆTTING

1 B36
2 HB
3 NSÍ
4 KÍ
5 B68
6 EB/Streymur
7 GÍ
8 ÍF
9 Skála
10 VB



### *Tórður Mikkelsen* – SJÓNVARP FØROYA

1. HB
2. B36
3. KÍ
4. NSÍ
5. B68
6. GÍ
7. VB
8. EB/Streymur
9. ÍF
10. Skála



